# ið
# n

TING-HELLAN



flokkinum og heilt serliga Javnaðarflokkinum illa við, at teir vóru tiknir av ræði. Teir politikarar, sum mannaðu Tingið tá, høvdu teir flestu stríðst eitt hart stríð í 40-árunum. Tað sást aftur í orðaskiftinum og atburðinum teirra millum.

Í 1965 fekk so andstøðan tann rætta kjansin at vinna samgonguni neisir. Tingið kom sum vant saman á Ólavsøku, og tá helt løgmaður sína løgmansrøðu. So kom kinkur í. Ein tingmaður var burturstaddur vegna sjúku. Tá løgtingsformaðurin, sum var Sámal Petersen, skuldi seta Tingið, møtti andstøðan — Sambandsflokkurin og Javnaðarflokkurin — ikki upp. Siður var tá, hóast tað ikki stóð í Tingskipanini, at Løgtingsfundur varð ikki settur uttan so, at meira enn helmingurin av tingmonnum var á fundi. Nú stóð 14 móti 14 — helvtin av Tinginum møtti upp, hin helvtin ikki.

Hetta stóð við í fleiri dagar, hvussu nógvar veit eg ikki. Men 27. august tók løgtingsformaðurin avgerð um at seta tingfundin við 14 tingmonnum (helvtini), og tá varð uppskot til fíggjarlóg lagt fram. Tá formaðurin hevði sett fundin, komu allir hinir 14 inn í salin.

Soleiðis endaði tað boykottið.

## Boykottið fríggjadagin

Alt hetta er søga og er nevnt sum dømi um tær fáu ferðir, tingmenn hava boykottað løgtingsarbeiðið. Nú komi eg fram til nútíðina. Fríggjadagin hendi so tað, at ein partur av andstøðuni, Tjóðveldisflokkurin og Miðflokkurin, brúkti ta elektronisku atkvøðuskipanina til at boykotta tingarbeiðið. Fyrr var tað soleiðis, at tingmenn skuldu reisa seg at atkvøða fyri ella ímóti. Teir, sum sótu, greiddu ikki atkvøðu. Við hesi skipan kundi tað ikki hent, sum hendi fríggjadagin.

Tann nýggja, elektroniska atkvøðuskipanin virkar soleiðis, at tingmenn við at trýsta á ein knøtt — teir eru tríggir at velja ímillum, ikki tveir, sum summi halda — kunna atkvøða "ja" ella "nei" ella "atkvøði ikki". Í Tinginum fríggjadagin atkvøddu 20 tingmenn av 32 ja. Ein — tingmaður Sjálvstýrisfloksins — var uttandura. Tingmenninir hjá Tjóðveldisflokkinum og Miðflokkinum vildu ikki atkvøða. Tað hevði við sær, at atkvøðugreiðslan kundi ikki gerast liðug. Boykottið av tingarbeiðinum vardi í ein hálvan tíma.

Hetta líkist púra ongum.

Tað stendur týðuliga og greitt í Tingskipanini, at *"Løgtingsmaður skal geva seg undir avgerð formansins"*. Tí áttu allir tingmenn at atkvøtt, tá formaðurin segði, at teir skuldu atkvøða — sama, hvat teir annars hildu um uppskotini, teir skuldu atkvøða um.

Tað einasta, Tjóðveldisflokkurin og Miðflokkurin fingu burtur úr hesum mótmæli, var, at føroyingar ivast í teirra seriøsiteti, og at tað nú stendur í gerðabók Løgtingsins, at ongin atkvøddi ímóti.

## Málini

Málini, sum talan er um — løgtingsmálini nr. 91 og 92 — eru ein gudsjammurlig fløkja. Lógartekstirnir í føroysku "lógini" og donsku lógini eru eins, men viðmerkingarnar samsvara als ikki. Orðið "lóg" havi eg skrivað í gásareygum, tí sambært Heimastýrislógini kann Løgtingið samtykkja "løgtingslógir", men ikki "lógir". Hetta seinna hevur í danska ríkinum bara Fólkatingið heimild til. Tað má eisini vera ein spurningur, hvussu "lógin" skal kunngerast. Í Heimastýrislógini stendur, at *"Tær av løgtinginum samtyktu og av landsstýrisins formanni staðfestu lógir verða nevndar løgtingslógir"*, og talan er eisini um *"staðfesting løgtingslóganna"*. Tað kundi bent á, at løgmaður kann staðfesta "løgtingslógir", men ikki "lógir". Hetta er so fyrst og fremst ein løgfrøðiligur spurningur.

Tað verður ov drúgt at fara ígjøgnum bæði málini, men eg havi hug til at draga fram tvey ting, sum eg haldi vera serliga áhugaverd í øllum hesum meldrinum: annað er eitt upprit frá løgfrøðingi hjá Løgtinginum, hitt er ein oddagrein í Dimmalætting.

Løgtingsmál nr. 91 er tann føroyska "lógin", nr. 92 er uppskot til ríkislógartilmæli um eisini at samtykkja ta donsku lógina við hennara viðmerkingum, sum ikki samsvara við føroysku viðmerkingarnar. Um hetta skrivar løgfrøðingurin hjá løgtinginum:

*"Ger Løgtingið hinvegin av at samtykkja uppskotið til ríkislóg í løgtingsmáli nr. 92, so er ilt at finna svar upp á spurningin um, hvørja heimild uppskotið í løgtingsmáli nr. 91 hevur. Harumframt er uppskotið tá uttan meining og innihald."*

Hetta er eitt upprit til Formansskap Løgtingsins og eitt álvarsamt upprit. Har stendur, at um Løgtingið samtykkir uppskotið um ríkislógartilmælið, er innihaldið í uppskotinum frá Landsstýrinum einki vert. Basta.

## Samstarv

Tað tykir mær løgið, at samgongan hevur slíkan skund at skrumbla hesi mál ígjøgnum. Eftir kríggið endaði stríðið um tey ríkisrættarligu viðurskiftini við, at ein tepur meiriluti á Tingi samtykti Heimastýrislógina. Síðani hevur eitt eljustríð verið um hesa lóg.

Nú trumfar ein meiriluti, sum er størri enn ta ferðina, eina nýggja skipan ígjøgnum, sum andstøðan ikki kann taka undir við. Skula vit so aftur ta næstu hálvu øldina gott og væl stríðast um innihaldið? Hava vit ongantíð hug til at royna at finna saman?

Tað kemur fyri, meira enn so, at eg eri mestsum fullsamdur við oddagreinunum í Dimmalætting. Oddagreinini seinasta fríggjakvøld 6. mai taki eg fult út undir við. Har stendur:

*Tað er tí hugstoytandi at hoyra umboð fyri samgonguna kveistra allar royndir um at kjakast um innihaldið í lógini av borðinum_"*

Og:

*"Vit sakna eina frágreiðing um, hví ætlanin er at fáa Føroya Løgting at samtykkja tvær lógir, ið verða bygdar á tvær ymiskar grundgevingar.*

Vit síggja longu nú ruðuleikan av hesi skipan."

Og:

*"Tíverri eru uppskotini ikki nóg góð. Tað átti at borið til at komið fram til eina orðing av skipanini, sum bar í sær, at tey, ið eru ímóti, einans hava eina politiska orsøk til at vera ímóti og ikki eina orsøk, ið botnar í beinleiðis ella óbeinleiðis løgfrøði og misog dupultfatanum.*

*Spurningurin er, um uppskotið, ið nú liggur á tingborði, er so virðismikið, at tað fyri ein og hvønn prís skal trumfast ígjøgnum nú, áðrenn tingið fer heim.*

*Hvat er tað, ið hastar?"*

Ja, hvat er tað, sum hevur so ovurhonds stóran skund? Málið er stórt. Er endamálið einans at vinna Tjóðveldisflokkinum neisur, er tað ikki nóg gott. Serliga er tað ikki nóg virðiligt fyri ein løgmann, sum jú er løgmaður fyri øll, eisini tjóðveldisfólk.

Eg haldi, at løgmaður og øll samgongan áttu at lurta eftir Dimmalætting: Bíðið eitt sindur við hesum málinum. Hetta hevur alstóran týdning fyri Føroya fólk, fyri møguleikanum at finna eina tjóðskaparliga fyribilssemju og fyri friðarligum viðurskiftum á politiska arbeiðsmarknaðinum.

Ikki rokni eg við, at ein endalig semja kann fáast. Sum tjóðveldismaður gangi eg út frá, at Tjóðveldisflokkurin gevst ikki, fyrr enn fullveldi av einum ella øðrum slag er stovnað.

Kortini haldi eg, at ein fyribilsskipan Danmarkar og Føroya ímillum kundi verið frægari enn Heimastýrislógin. Tí áttu løgmaður og allir floksformenninir at sett seg niður og í frið og náðum í nakrar mánaðir at roynt at funnið eina semju um eina fyribilsskipan.

Tað er mítt tilmæli.

> *"Ikki rokni eg við, at ein endalig semja kann fáast. Sum tjóðveldismaður gangi eg út frá, at Tjóðveldisflokkurin gevst ikki, fyrr enn fullveldi av einum ella øðrum slag er stovnað.*
>
> *Kortini haldi eg, at ein fyribilsskipan Danmarkar og Føroya ímillum kundi verið frægari enn Heimastðrislógin. Tí áttu løgmaður og allir floksformenninir at sett seg niður og í frið og náðum í nakrar mánaðir at roynt at funnið eina semju um eina fyribilsskipan.*
>
> *Tað er mítt tilmæli."*
>
> Finnbogi Ísakson, fyrrverandi løgtingsformaður